## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin, fríggjadagin og leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum ella av landsynningi og sirm ella mjørki, men stundum onkur sólglotti. Hitin um 10 stig, men har sólin sær millum 12 og 16 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul millum vestan og norðan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Summar Festivalurin hevur bestu skránna

**Summar Festivalurin endaði fremst í eini atkvøðugreiðslu hjá Vikublaðnum um, hvør føroyskur festivalur hevur áhugaverdastu skránna**

FESTIVALAR
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hevur Vikublaðið havt eina atkvøðugreiðslu á sínari heimasíðu, har tað hevur borið til at atkvøða um, hvør av føroysku tónleikafestivalunum hevur mest áhugaverdu skránna í ár.

Næstan 2.000 fólk hava atkvøtt, og meira enn helvtin av teimum heldur, at Summar Festivalurin hevur bestu skránna.

Summar Festivalurin fekk 53 % av atkvøðunum, meðan G-Festivalurin, sum var næstfremstur, fekk 21 prosent. Fjarðafestivalurin fekk seks prosent, og hinir festivalarnir fingu færri atkvøður.

# - Kemur ikki óvart á meg

**Steintór Rasmussen er ikki bilsin av úrslitinum av atkvøðugreiðsluni hjá Vikublaðnum, har annarhvør helt, at Summar Festivalurin hevur mest spennandi skránna í ár**

FESTIVALAR
*Petur Háberg*

Spurdur hvat hann heldur um úrslitið, sigur hann: - Skal eg vera heilt erligur, so kemur tað ikki óvart á meg. Eg haldi, at vit í ár hava eina serliga góða skrá.

Scorpions og Kim Wilde, sum bæði eru aktuell við nýggjari fløgu, eru sera sterk nøvn. Og umframt góð útlendsk nøvn, hava vit eisini nøkur, eftir okkara tykki, framúr føroysk nøvn. millum annað Jógvan, Páll Finnur Páll, Týr og The Dreams.

- Tað merkir kortini ikki, at hinir festivalarnir ikki hava eina góða skrá, tí tað hava teir. Men sum sagt; úrslitið kemur ikki óvart á meg, sigur Steintór, sum leggur aftrat: - Og tá skal sigast, at vit enn ikki hava kunngjørt øll nøvnini. Longu nú týsdagin koma vit við einum nýggjum, útlendskum navni.




*Fólki dámar væl Summar Festivalin (savnsmynd)*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 31 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 34 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 18 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. yvir Skotlandi fer spakuliga norðureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer vestureftir og grynnist. Lágtrýstið við Írland fer eystureftir og dýpist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/7 kl. $06^{00}$ – 2/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 8,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 24. juni | Máni ongst frá jørðini |
| 30. juni | Fullmáni |
| 7. juli | Seinna kvarter |
| | Jørðin longst frá sólini |
| 9. juli | Mánin næstur jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. Juli | 10.28 | 22.49 | 09.28 | 21.49 | 09.43 | 22.04 | 00.06 | 12.28 | 01.06 | 13.28 | 08.43 | 21.04 | 07.43 | 20.04 | 10.43 | 23.04 | 11.43 | - | 10.13 | 22.34 | 11.28 | 23.49 |
| 5. Juli | 11.10 | 23.30 | 10.10 | 22.30 | 10.25 | 22.45 | 00.49 | 13.10 | 01.49 | 14.10 | 09.25 | 21.45 | 08.25 | 20.45 | 11.25 | 23.45 | 00.04 | 12.25 | 10.55 | 23.15 | - | 12.10 |
| 6. Juli | 11.51 | - | 10.51 | 23.26 | 11.06 | 23.41 | 01.30 | 13.51 | 02.30 | 14.51 | 10.06 | 22.41 | 09.06 | 21.41 | - | 12.06 | 00.45 | 13.06 | 11.36 | - | 00.30 | 12.51 |
| 7. Juli | 00.26 | 13.00 | - | 12.00 | - | 12.15 | 02.26 | 15.00 | 03.26 | 16.00 | 11.15 | 23.50 | 10.15 | 22.50 | 00.41 | 13.15 | 01.41 | 14.15 | 00.11 | 12.45 | 01.26 | 14.00 |
| 8. Juli | 01.35 | 14.11 | 00.35 | 13.11 | 00.50 | 13.26 | 03.35 | 16.11 | 04.35 | 17.11 | - | 12.26 | 11.26 | 23.49 | 01.50 | 14.26 | 02.50 | 15.26 | 01.20 | 13.56 | 02.35 | 15.11 |